WWW.HVALBA.FO

NR. 10 MAI 2016

# EFTIRSKÚLIN

WWW.EFTIRSKULIN.WORDPRESS.COM

ÓKEYPIS



Hvalba. Mynd: Rúni Thomsen

# Eftirskúli í Føroyum



RÓSA SAMUELSEN
Borgarstjóri
í Vága kommunu

Nú hevur leingi verið tosað um at seta á stovn eftirskúla í Føroyum, men einki er hent.

Vit føroyingar hava gjøgnum árini sent alt ov nógv av okkara ungdómi av landinum at útbúgva seg í tí aldrinum, tá tey flestu finna sær maka. Hetta hevur ført við sær, at nógv teirra ikki eru vend heimaftur, men hava fest rót uttanfyri landoddarnar.

Tíbetur eru útbúgvingarmøguleikarnir her á landi batnaðar munandi seinnu árini, og fleiri og fleiri hava møguleika at nema sær útbúgving, uttan at vera noydd at fara av landinum.

Enn er tó langt á mál.

Eftirskúlin eigur nú tørn. Tá hann er komin, gevur hetta okkara ungdómi møguleika fyri at sleppa á eftirskúla í Føroyum. Skúlin kemur tó ikki at forða teimum, ið ynskja at fara av landinum at ganga á eftirskúla at gera so.

Latið verður eisini upp fyri møguleikanum, at ungdómar úr øðrum londum koma higar at at nema sær eftirskúlaútbúgving.

Hesi koma so at læra føroyska samfelagið, málið og mentanina at kenna, eins og føroyskan ungdóm. Eisini kemur føroyski ungdómurin at kenna hesar ungdómar og læra um mentan teirra. Tað kann føra við sær frugtabært samstarv í framtíðini, øllum pørtum at frama.

Ta fyrstu tíðina, røtt var um at seta eftirskúla á stovn í Føroyum, var bert tosað um, at skúlin skuldi vera í Hvalba. Nú verður eisini tosað um, at hann skal liggja á Drelnesi.

Sjálva staðsetingina gangi eg ikki so høgt uppí.

Fyri mær kundi hann ligið í Vága kommunu fyri tað. Tað mest týdningarmikla er, at skúlin kemur, og tað ongantíð ov skjótt.

Tó so, vit í Føroyum hava eina avbjóðing av teirri miðsavnan, ið fer fram her á landi. Havnin og miðøkið annars er við at koma í rasshaft av, at so nógv fólk vilja búgva har. Tað kemur at lætta um trýstið á miðøkið, eins og tað kemur at gagna Suðuroynni, um eftirskúlin verður bygdur har.

Á eftirskúlanum verður tørvur á fólki við hægri útbúgvingum til at undirvísa, so hetta er funnin fressur at fáa fleiri suðuroyingar at venda heimaftur aftaná lokna útbúgving.

At leggja eftirskúlan í Suðuroy er eisini eitt gott boð at bjóða eitt skúlatilboð til okkara ungdómar í eini av okkara vakrastu oyggjum. Hetta ger eisini, at ungdómurin hevur møguleika at verða burturi frá býarlívinum eitt tíðarskeið.

Ikki so, at býarlívið er nøkur hóttan ella forðing, men hetta gevur ungdóminum møguleika, í tøttum sambandi við skúlaumhvørvið, lokalsamfelagið og vinnulívið at læra at kenna okkara samfelag frá heilt øðrum sjónarhornum, enn tey eru von við.

Ofta verður sagt, at tað er sunt at fara í onnur lond at læra aðra mentan, men møguleikin má eisini verið í okkara samfelag at mennast saman við øðrum ungdómi.

Vit eiga eisini at torað at bjóða okkum fram til onnur lond. Her hugsið eg m.a. um grønlendskan ungdóm. Broytingin at fara til Danmarkar hjá einum ungdómi úr útjaðaranum í Grønlandi er sera stór. Tað er meira hóskandi fyri tey at koma til Føroya, her mentanin líkist meira teirra heimligu mentan.

Skulu vit kunna bjóða ungdómi úr okkara grannalondum hendavegin, er eisini áhugavert at hugsað í breiðari høpi við at hava vertsfamiljur, sum bjóða sær til at taka sær av ungdóminum í vikuskiftum og frítíðum.

Latum okkum føroyingar taka lógvatak saman og seta á stovn eftirskúlan og tað ongantíð ov skjótt. Ein eftirskúla, har nýhugsan er í hásæti.

**EFTIRSKÚLIN ynskir ÍTRÓTTARHÁSKÚLANUM hjartaliga til lukku við stovnanini**

**Samgonguskjalið 2015 millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn 14. september 2015**

**EFTIRSKÚLI OG HÁSKÚLAR**

- Tað hevur skund at seta á stovn eftirskúla og útbyggja háskúlar.

• Karmar skulu skapast, so hesir kunnu virka í ymiskum samstørvum.

# Tað góða lívið má vera málið og endamálið



JÓGVAN PHILROW
*Námsfrøðingur og formaður í Pædagogfelagnum*

Samfelagið uppalir og lærir okkum at vera strongd, at vera ónøgd og elur fram mistreysti

Tá samfelagið flytur sjóneykuna yvir á botnlinjuna, hvørt vit eydnast ella ikki í lívinum - og tá skipanir, dagstovnar, skúlar og annað flyta sítt virksemi yvir í at hugsa effektivitet í mun til pengarnar, heldur enn hvat einstaka barnið fær burturúr, tá fara vit at skapa okkum nakrar størri samfelagsligar trupulleikar.

Hvat meini eg við? Jú, vit eru eftirhondini uppfløskað við, at alt skal vera effektivt, og øll skulu fáa sum mest burturúr fyri minst møguligt stríð ella bara fyri minst. Hugtakið eitur á enskum "New Public Managment". Tað almenna skal renna skjótari, megna meira og altíð fyri minni.

Tað tykist ofta, sum tað verður gloymt, at tað almenna eisini er skúlin, vøggustovan, barnagarðurin og aðrir stovnar, sum taka sær av menniskjum, ið einamest hava tørv á, at fólk hava tíð til tey, og serliga her kann tað, at starvsfólk skulu renna skjótari, hava vandamiklar avleiðingar.

Vit hoyra um, hvussu okkara útbúgvingarskipanir skulu vera kappingarførar við umheimin, hvussu vit sum einstaklingar skulu vera kappingarfør - tí skal samfelagið tryggja, at øll fáa sum mest burturúr, helst so skjótt sum yvirhøvur gjørligt.

Kanningar vera lagdar fram, har inntøkurnar hjá javnaldrum verða samanbornar í mun til útbúgvingargongd, sum um inntøkan var skilabesta amboð at staðfesta, hvørt skipanir eru skilagóðar ella ikki - og kanska hevur hetta eisini ein ávísan týdning.

Útbúgvingarstøð og -lond vera uppgjørd við "rankinglistum", eitt nú PISA og annað fyri at meta, um skipanirnar eru á rættari leið. Alt tí at búskapurin og nøkur lyklatøl í búskapinum skulu ganga upp.

Hvat er "tað góða lívið" - ein spurningur, ið helst hevur ymisk svar, alt eftir hvønn tú spyr. Tó tykjast nógv tekin vera um, at fleiri og fleiri seta tað góða lívið í samband við fíggjarligt rásarúm. Er talan um vøkstur í samfelagnum, verður bert hugt eftir búskaparligum teknum. Er búskaparvøkstur, tá smílast politikararnir og klappa sær sjálvum á herðarnar, men hendir tað øvuta, er villur uppstandur, og so kappast skipanir um at skerja útreiðslur, ofta uttan serligt fyrilit, uttan at hugsa um avleiðingar, serliga menniskjaligar avleiðingar. Virðið hjá einum menniskja liggur ofta í at vera til nyttu, og vera til nyttu er tætt samanknýtt við at hava eitt starv, sum gevur tí einstaka meining.

Tá ið endamálið við barnaárunum verður at klára seg væl í framtíðini, og tað at klára seg væl tykist merkja at hava eitt starv við nógvari løn heldur enn eitt lív, sum gevur meining, so setur tað krøv til, hvussu samfelagið skipar seg.

Dagstovnar og skúlar skulu tá vera klekingarmaskinur, fram um mentanarberandi stovnar. Tær skulu tryggja, at børn ogna sær so nógva vitan og førleikar sum gjørligt so skjótt sum gjørligt, soleiðis at tey standa seg betur í kappingini um tey "góðu" ella væl løntu størvini. Búskapurin skal økjast - tí tað er soleiðis vit máta, hvørt vit liva í einum samfelagi í "menning".

Úrslitið gerst skjótt, at vit bert skulu renna skjótari og skjótari - og tað eru tekin um, at hetta er veruliga gongdin, tí vit síggja hækkandi strongdarmátingar, fleiri sjúkrameldingar og eitt stórt útboð av sjálvsmenningarskeiðum við heitum sum "mindfulness", at læra at liva í nú'inum er vorðið ein handilsvøra. Og síðani mótrákið, sum er byrjað, har vit skulu læra at standa stinn og ikki lata okkum ríva við.

Alt hetta er við til at leggja lunnar undir "handils-gering"(kommersialisering) av samfelagnum. Mátingar vera gjørdar fyri at kanna, um ein stovnur framleiðir nokk av hágóðsku ella vitanarberarar, heldur enn um menniskjuni, sum koma úr skipanunum, eru væl grundað í lívinum. Skipanir vera einsháttaðar, og fjølbroytni verður sæð sum ein trupulleiki. Sir Ken Robinson, ein enskur skúlaserfrøðingur, viðger í fyrilestrinum hjá sær, "Changing Education Paradigms", trupulleikarnar við einsháttingini (standardiseringini) - tí tann natúrliga avleiðingin av hesum er, at minni og minni rúm er fyri teimum, ið ikki heilt passa inn í eina skipan, sum gerst alsamt trengri. Líka so væl sum ein ørgrynna av útgávum frá serfrøðingum í hópatali vísa á, at fjølbroyttir læruhættir og umstøður hava avgerandi týdning fyri úrtøkuna hjá móttakaranum.



Hvalba. Mynd: Rúni Thomsen

Vit øtast øll vøksturin í harðskapsmálum, vøksturin í sálarligum trupulleikum, og seta kanska ikki so ofta spurning við samfelagsskipanina, ella um hesar skipanir eru partur av trupulleikanum ella ein bati í mun til trupulleikan.

Spurningurin er kanska, um vit kunnu vænta annað, tá ið øll skulu verða meira líka, renna skjótari, megna meir og tola meir. Sjálvandi hevur tað avleiðingar.

## At liva eigur at vera eitt endamál í sjálvum sær

Í námsfrøðiliga yrkinum er evnið "robust" ella mótstøðuførið hjá barninum, hvussu stinn tey eru, eitt viðkomandi evni, og vit vita, at neyðugt er at arbeiða við at styrkja børnini, eisini kensluliga, soleiðis at tey megna tær avbjóðingarnar, sum standa teimum fyri framman í lívinum. Sum oftast tykist kjakið tó at snúgva seg um, hvørt vit tora at lata børnini megna nakrar kropsligar avbjóðingar, at klatra, at ganga í óslættum, og hvussu skjótt teimum skal verða veitt hjálp, tá tey eru dottin. Hetta er eisini partur av stóra evninum at vera mótstøðuførur, tá lívsins ódnir bresta á rundan um teg, men ikki alt.

Fjølbroytni og ymiskleiki í útbúgvingarskipanini átti heldur at verið ein mátistokkur fyri góðskuni í okkara lærustovnum, heldur enn PISA. Hvussu væl okkara samfelag kann møta øllum við teirra ymisleika, bæði stórum og smáum, teimum skjótu og teimum seinru, teimum bókligu og teimum handaligu, og teimum, sum eru væl fyri á fleiri økjum. Hvussu væl møta vit teimum, sum eru í einum aldudali ella aldutoppi? Hvussu við at hyggja at, hvussu vit kunnu skipa okkum soleiðis, at vit møta og fjálga um ymisleikan? Tí eitt er vist, skulu øll gera tað sama, liva av tí sama og passa inn í tað sama, so verður tað eitt lítið spennandi samfelag, og eg ivist eisini stórliga í, hvørt fíggjarligur framburður er møguligur.

Vit mugu tryggja fjølbroytnið við at styrkja læru- og menningarstovnar; fjølbroyttar vøggustovur, barnagarðar og skúlar er leiðin. Fjølbroyttar á tann hátt, at námsfrøðingar og lærarar sleppa at hava eitt størri frælsi til sjálv at leggja læruumhvørvið til rættis. Samstundis mugu vit arbeiða við at styrkja og varðveitta meira av "frælsa" rúminum hjá børnunum, soleiðis at tey sjálv sleppa at seta sín dám á sína menning og gerandisdag.

Føroyar eru longu eitt heldur mentanarligt einsháttað (homogent) samfelag, og tað versnar við flytingini, fyrst til høvuðsstaðin og síðani av landinum. Útjaðarin minkar, og vit eru undir stórum mentanarligum trýsti frá umheiminum, málsliga og harvið eisini mentanarliga. Sjálvandi koma nýggjar avbjóðingar, tá ið nýggjar mentanir koma til landið. Her er ikki talan um at siga nei takk til avbjóðingarnar ella ávirkan uttanífrá, men heldur at hugsa, hvussu vit fáa gagnnýtt nýggju mentanina, samstundis sum vit brúka og varðveita ta gomlu mentanina. So væl sum útjaðarin kann læra av miðstaðnum, so gongur tað eisini hin vegin.

Vit eiga at varðveita og stimbra tað fjølbroytnið, sum er - fjølbroytni gevur okkum eina styrki. Føroyar hava leingi verið sera skapandi á mentanarpallinum, tónleikur og list annars hava verið partur av samfelagnum í langa tíð. Vit mugu varðveita hendan fjølbroytta sið, eisini tí mugu vit varðveita eitt fjølbroytt vøggustovu-, barnagarðs- og skúlatilboð.

Eitt eftirskúlatilboð í Hvalba í Suðuroynni eigur at vera eitt kærkomið høvið at styrkt bæði eitt fjølbroyttari skúlatilboð, umframt ein styrk av tí fjølbroytta mentanarlívinum. Ein hjálp hjá miðstaðnum og øðrum at læra av útjaðaranum. Her hugsi eg, at tað hevði gagnað nógvum at sloppið at upplivað og verið við í øðrvísi felagsskapum enn teimum, sum miðstarøkið kann bjóða, og kanska tikið tað við norður um fjørðin aftur. Tey ungu, sum fáa møguleikan at ganga í eftirskúlan, í Hvalba, fáa kanska nakrar nýggjar avbjóðingar og eitt nýtt sjónarhorn at síggja seg sjálvi úr og fáa eygað á, hvat gevur meining fyri tey.

Tá ið menniskju sleppa at arbeiða við viðurskiftum, sum geva teimum meining, økist ikki bara framleiðslan, men eisini góðskan, og harvið fáa øll meira burturúr. Tí hevur eisini tað týdning fyri samfelagið at styrkja um fjølbroytnið heldur enn at einsháttа.

So aftur til spurningin - hvat er tað góða lívið? Snýr tað seg um fíggjarligt rásarúm ella um okkurt heilt annað? Eg vil við øllum hesum so pástanda, at tað góða lívið snýr seg ikki um fíggjarligt rásarúm, men heldur um at duga at stýra á lívsins ofta buldruta havi. Duga at stýra, tá tað leikar á, og duga at stýra, tá tað gongur væl. Tað snýr seg um at hava møguleikar at læra um og arbeiða við tí, sum gevur einstaklinginum meining í tilveruni. Ella sum Sir Ken Robinson sigur í bókini "Finding your element" – tað snýr seg um at finna útav, hvat tú dugir best.

Útgevari: Rit - Ritstj.: Tummas í Dali - Uppseting: Rit - Umbróting: Grafix 504251

EFTIRSKÚLIN nr. 10 er prentaður í 2.000 eintøkum, sum verða latin lesarum ókeypis

# Á eftirskúla í Føroyum – til hvat?



RANNVEIG HOVGAARD
*Lærari sandvík*

Sum lærari merkir tú ofta, at teir eldru næmingarnir eru skúlatroyttir. Hetta hoyra vit eisini um úr grannalondum okkara, og alt fleiri næmingar – serliga í Danmark – fara á eftirskúla.

Men hví skalt tú fara á eftirskúla? Er tað fyri at mennast fakliga, at koma heimanifrá ella fyri at menna sjálvsálitið?

Hesar spurningar eiga leiðarar fyri øllum eftirskúlum at gera sær greitt, áðrenn tey bjóða ungum fólki heimanifrá.

Ein eftirskúli er sermerktur við, at næmingarnir búgva á skúlanum allar undirvísingardagar, og at teimum eisini stendur í boði at verða har um vikuskiftini. Í Danmark eru fleiri enn 250 eftirskúlar, har hvør einasti hevur sítt eyðkenni, tað kann verða eftirskúli við denti løgdum á filmslist, tónleik, ítrótt, orðblindni og mangt annað, men hvør einasti ein hevur sítt eyðkenni, og útboðið í Danmark er sera stórt.

Í Danmark byrjaðu eftirskúlarnir longu seinast í 1800 talinum, tá ið Christen Kold og N.F.S. Grundtvig alment tosaðu um øðrvísi skúlaskipan enn ta kendu, sum tá var í Danmark.

Kold legði stóran dent á, at trúarfrælsi skuldi galda í skúlunum. Hetta var viðvirkandi til, at hann ikki fekk arbeiði sum lærari í nógv ár.

Í 1852 stovnaði Kold fyrsta frískúlan í Danmark, og hann var viðvirkandi til, at 100 frískúlar á Fjóni og Sælandi vóru stovnaðir. Kold var nógv ávirkaður av Grundtvig, men ein stórur munur í sjónarmiðum teirra, var, hvussu gamlir næmingarnir skuldu vera fyri at fara á háskúla ella eftirskúla. Kold helt fast við, at best var at byrja beint aftan á fermingina, meðan Grundtvig helt, at best var at bíða, til tey vóru 18 ára gomul.

## Fyrsti danski eftirskúlin

Hin fyrsti eftirskúlin í Danmark varð stovnaður í 1879, men í árunum aftaná komu fleiri eftirskúlar serliga í Suðurjútlandi, sum tá var undir Týsklandi, og har týskt varð tosað í vanligu skúlunum. Tí var eitt gott høvi hjá danska minnilutanum at lata børn síni fara á eftirskúla, har danskt mál og donsk mentan var í hásæti.

Í 1920´unum vóru nógv ung fólk, sum fóru á eftirskúla. Hetta hekk uttan iva saman við, at størri sjálvstøði verður latið eftirskúlunum í hesum tíðarskeiðinum, so skúlarnir kunnu skapa sítt egna virðisgrundarlag, og aftur í 1980´unum fara nógv ung á eftirskúla, og er tað í hesum tíðarskeiðnum, at eftirskúlarnir fara at leggja dent á serkunnleika innan ávís øki t.d. tónleik ella ítrótt. Áðrenn hetta var undirvísingin nærum eitt framhald av undirvísingini í fólkaskúlanum.

## Háskúli í Føroyum

Í Føroyum hava vit ein háskúla. Hugskotið aftan fyri háskúlarørsluna bæði í Danmark og eisini í Føroyum var grundlagt í demokratisku menningini í Danmark aftan á 1848.

Nógvir føroyingar fóru til Danmarkar á háskúla, men í 1899 byrjaði Føroya Fólkaháskúli virki sítt. Hesin skúlin hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri samleikan hjá føroyingum. Í fyrstuni var hetta einasti skúli í landinum, har gjølla varð undirvíst í føroyskum máli, bókmentum og søgu. Úr míni heimbygd – Sandvík – hava ógvuliga nógv fólk verið á háskúla, og kom hetta at ávirka lív teirra altíð. Tey fingu serligan áhuga fyri føroyskum máli og fyri føroyskari søgu.

## Føroyskur eftirskúli

Tankin um ein føroyskan eftirskúla dámar mær væl, og mær dámar serliga væl, at hann skal verða í Suðuroynni. Sum nevnt eru tað alt fleiri ung fólk, sum fara á eftirskúla – oftast í Danmark – heldur enn at fara í 10. flokk. Hjá ungum fólki norðanfyri kann tað vera – næstan – sum at fara í eitt annað land at fara til Suðuroyar í eitt ár. Tey kunnu fara heim um vikuskiftini, familjan kann vitja, men kortini eru tey heimanifrá. Eg havi hoyrt frá fleiri føroyingum, sum búgva uttanlands, at tað hevði verið ein dreymur fyri tey, at børn teirra kundu farið á eftirskúla í Føroyum, so børn teirra á tann hátt fingu neyvari kunnleika til føroyskt mál og føroyska mentan.

Tað er tó sera týdningarmikið, hvat ein føroyskur eftirskúli skal hava at bjóða, og tað er eisini av týdningi, at skúlin ikki bjóðar tað sama, sum tú kanst fáa við at fara á SIT, á skúlan við Áir ella á háskúla ella við at fara til Danmarkar. Tað má eisini verða okkurt, sum ung fólk úr øðrum londum kunnu fáa gleði og gagn av.

Eg haldi, at núverandi 10. flokkur í Suðuroynni skuldi verið ein partur av komandi eftirskúlanum, so tað bar til at tikið 10. flokk á eftirskúlanum, men at dentur samstundis verður lagdur á ymiskar serføroyskar lærugreinir, sum beinleiðis blivu skipaðar ella lagaðar til júst hendan eftirskúlan.

Hvat er so sermerkt fyri Føroyar og fyri Suðuroynna? Føroyar eru sermerktar við at hava ógvuliga nógv fólk, sum eru dugnalig innan tónleik. Í Hvalbiar skúla, har eg arbeiði, hava vit eitt neyvt samstarv við Musikkskúlan, og tað sýnist, sum hetta hevur góða ávirkan á lærifløleikan hjá næmingunum. Okkara 3. flokkur er ein royndarflokkur, har serliga stórur dentur verður lagdur á tónleik. Eg haldi, at eitt tilboð á føroyska eftirskúlanum kundi verið tónleikur og sangur. Vit hava eisini nakað serføroyskt at bjóða fram sum t.d. føroyskan dans, kvæðini, Kingosang, so okkara tilboð vóru eitt sindur øðrvísi enn tey, sum kunnu fáast á tónleikaeftirskúlum í Danmark.

Vit hava nógv dugnalig fólk í Føroyum innan handverk og list, og júst á hesum økinum hava vit eisini nakað, sum er sermerkt føroyskt, t.d. at binda, at skapa burtur úr tí, sum er í føroysku náttúruni – bæði við at brúka beinleiðis tilfeingið, sum er her, men eisini at fáa íblástur til t.d. úr føroysku náttúruni. Fyrr hevur leirverkstaður verið í Hvalba, so tí vita vit, at her eisini er eitt í løtuni óbrúkt tilfarsískoyti.

Vit hava eisini ómetaliga dugnalig skrivandi fólk, sum kundu undirvíst og skapt íblástur millum ung fólk, sum hava hug at royna seg á bókmentaliga økinum. Her kundu skiftandi rithøvundar vitjað skúlan og undirvíst í styttri ella longri tíð.

Føroyar eru ein fiskivinnutjóð og gomul landbúnaðartjóð. Tað hevði verið upplagt, at bjóða hesa vitan fram á einum eftirskúla. Tað hevði borið til, at havt samstarv við flakavirki, við útróðrarfólk, við bøndur og so lagt dent á at brúkt ráevnini til at gjørt burturúr – bæði til matna og klæðna.

Danska Efterskoleforeningen sigur í blaði sínum í fjør, at nýggj kanning vísir, at næmingar, sum hava tikið 10. flokk á eftirskúla, hava størri sannlíkindi fyri at gjøgnumføra eina ungdómsútbúgving enn næmingar, sum ikki hava verið á eftirskúla.

Uttan iva mennast tey nógv við at verða burturi heimanifrá, og uttan iva mennast tey eisini nógv við at vera í einum hópi, har neyðugt er at taka atlit til onnur, og har lærutilgongdin er øðrvísi enn í vanliga fólkaskúlanum.

Vónandi verður eftirskúlin í Suðuroynni veruleiki um ikki so langa tíð. Møguleikarnir eru óteljandi, og vit í Suðuroynni kunnu bara gleðast um, at um ikki alt ov langa tíð fara ung fólk úr øllum Føroyum og eisini úr øðrum londum at síggjast í býar- og bygdarmyndunum í Suðuroynni.



Hvalba. Mynd: Rúni Thomsen

# Det handler om dannelse

CHRISTIAN HOUGAARD-JAKOBSEN
*Forstander på Midtsjællands Efterskole*



## Efterskoleformen er noget særligt

Jeg har fået lov at fortælle om noget helt særligt i det danske uddannelsessystem: efterskolen. For nogle år siden havde vi på Midtsjællands Efterskole besøg af en delegation fra Færøerne, der arbejdede på at etablere en efterskole der. I denne artikel har jeg fået lov at skrive om det, som vi fortalte delegationen den gang.

I artiklens første del vil jeg beskrive nogle af de generelle ligheder og forskelle, der er på efter- og folkeskolen. Derefter vil jeg konkret beskrive den efterskole, hvor jeg til daglig er forstander; Midtsjællands Efterskole. Hele artiklen kredser om noget af det, vi finder vigtigst hos os: tillid og fællesskab. Vi omtaler det bl.a. som "det gode møde imellem unge og voksne".

Efterskoleformen er noget særligt i det danske uddannelsessystem. Den er faktisk noget særligt i hele verden. Der er ikke tradition i andre lande for at drive skoler på samme måde, som de danske høj- og efterskoler fungerer. Der er mange lighedspunkter imellem en helt, almindelig dansk folkeskole og en efterskole, men der er også en række afgørende forskelle.

## Efterskolen og folkeskolen

Vi minder meget om hinanden for så vidt, som det drejer sig om at undervise eleverne i klassiske skolefag. De skal have en solid faglig ballast, som de kan anvende i deres videre uddannelsesforløb. Vi minder også om hinanden, når det handler om, at vi, som undervisere, er stærkt fagligt forbundne med stoffet og hinanden som kollegaer. Der er, også i efterskolen, en stærk professionstankegang.

Til gengæld er vi forskellige på helt grundlæggende planer. For det første er en efterskole en selvejende, værdibåret institution med en bestyrelse og en skolekreds som øverste myndighed. Værdigrundlaget har stor betydning for dagligdagen, for skolerne indretter sig i overensstemmelse med dette. Det har også indflydelse på rekrutteringen af medarbejdere og ikke mindst elever.

For det andet er der kostskoleformen til forskel. Eleverne bor på skolen hele døgnet, og det har stor betydning for den dannelsesproces, der foregår i løbet af et efterskoleår. I en kampagne fra Efterskoleforeningen blev det sagt, at et efterskoleår svarer til syv menneskeår. Der er noget om snakken. Vi oplever meget ofte forældre, der taler om, at de sendte en umoden ung på efterskole og nærmest fik en voksen hjem et år senere. Dette beskrives i det følgende.

Kostskoleformen betyder ganske meget i vores relation med eleverne. De oplever os voksne i mange forskellige situationer. Vi bliver altså mere og andet end en lærerrolle, og de får et mere helstøbt billede af, hvem vi er som mennesker. I deres folkeskoletid har de måske haft et endimensionelt billede af deres lærere. De oplever f.eks., at vi har vores familier med på skolen, når der skal spises aftensmad. De oplever os, når vi har dag- og aftenvagter. Her opstår mange gode snakke, hvor det i længden bliver svært at opretholde et forenklet billede af, hvem den enkelte voksne er. Dette kommer alle til gode i den almindelige undervisningssituation, for det får pludselig betydning, at det ikke bare er en tilfældig lærer, der underviser, men at det er en helt bestemt voksen med betydning, der rækker ud over undervisningen, og som man, som elev, har talt med om livets stjernestunder og kriser.

For det tredje har hver efterskole sin særlige faglige profil. Nogle er specialiserede skoler, hvor man har intenst fokus på én ting, f.eks. gymnastik, teater og musik eller fodbold. Andre er skoler for elever med særlige behov, f.eks. ordblinde. Andre igen er såkaldt almendannende, brede skoler med et mangfoldigt fagudbud. Dette har betydning for, hvilke elever man rekrutterer til sin skole. Nogle vil gerne det meget målrettede, hvor man møder andre unge, der brænder for lige netop det, man selv er stærkt interesseret i. Andre har brug for et fagligt løft f.eks. fordi de lider af ordblindhed. Helt andre vil derimod gerne det bredt funderede, hvor man møder mange forskellige typer, og hvor man kan fordybe sig i mange forskellige ting i løbet af et skoleår. Også det man ikke på forhånd vidste, at man havde interesse eller anlæg for.

For det fjerde er kammeratskabseffekten af afgørende betydning. Når eleverne bor sammen og skal have en dagligdag til at fungere, bliver venskabsrelationerne anderledes end derhjemme. På efterskolen er der ikke den samme mulighed for at trække sig tilbage og lade op til en ny dag på de arenaer, der ligger uden for hjemmet. Her er alle arenaerne samlet under samme tag. Venskaberne, der dannes på efterskolen, bliver således meget intense og anderledes fra noget andet, man har kendt til. Samtidig bliver det af lige så afgørende betydning, når tingene ikke fungerer. Her er følelserne blot intense med modsat fortegn. På efterskolen oplever eleverne, at der kun er os til at løse de udfordringer og problemer, der måtte opstå; naturligvis med hjælp fra de voksne.

For det femte foregår der på efterskolen et intergenerationelt møde, hvor eleverne møder mange forskellige voksne i mange forskellige aldersgrupper. De vil således kunne møde forskellige voksne, de kan spejle sig i. En af fordelene ved at kunne betro sig til de voksne på en efterskole er, at denne relation ikke varer ved. Når efterskoleåret er slut, drager eleverne ud mod nye horisonter, og nye elever fylder efterskolen op. Det binder altså ikke på samme måde, som når man betror sig til f.eks. sine forældre. Her varer relationen ved, og derfor er der af og til ting, som man, som ung, ikke involverer sine forældre i. Eleverne har imidlertid et stort behov for at få et voksenperspektiv på disse temaer, og det er der mulighed for i løbet af et efterskoleår. Ydermere kan de få flere forskellige perspektiver på det, når de taler med medarbejdere i forskellige aldersgrupper.

## Det er svært at beskrive efterskoleformen med ord

Det er ofte svært for efterskolefolk præcist at beskrive, hvad det særlige ved skoleformen er. Ofte siger vi, at det skal opleves, for at man rigtig forstår det. Der er, især i de senere år, lavet forskelligt videnskabeligt arbejde i og omkring efterskoleformen, der forsøger at indkredse det specielle. Imidlertid er der også ganske megen sandhed i, at det er svært at indfange med ord, hvad et efterskoleophold gør ved den enkelte.

Når det er bedst, bliver efterskoleåret til en begivenhed for de unge, som de bærer med sig resten af livet. Her opstår venskaber for livet. Her lærer de nye ting om sig selv, som de ikke på forhånd vidste noget om. Igennem mødet med andre unge og voksne, der tør at sætte sig selv i spil, dannes de til at kunne mestre det liv, der er deres i gensidig afhængighed af dem, som de er sat sammen med.

## Midtsjællands Efterskole – pionerånden, der er langtidsholdbar

I slutningen af 1950´erne samledes en række folk fra forskellige kirkelige organisationer, fordi man ville lave en efterskole, der skulle ligge midt på Sjælland. Det viste sig, at der stod en nyopført kommuneskole i den lille landsby, Ebberup, hvor elevgrundlaget ikke rakte til at kunne fylde skolen.

Sognerådet forlangte 700.000,- kr. for skolen, men frivilliggruppen havde kun 500.000,- kr. Det endte med, at sognerådet gav en gave på 200.000,- kr. til efterskolepionererne, hvorefter de kunne betale det, som sognerådet forlangte. Dermed kunne efterskolen starte op i 1960 i maj med de første efterskoleelever.

Idealet var at skabe en skole, hvor der var "vidt til væggene og højt til loftet". Denne formulering bruger vi stadigvæk på skolen. Selvom omstændighederne og vilkårene for at drive efterskole er væsensforskellige fra dengang, er det en vending, der stadig er god og meningsgivende.

I skolens første år var økonomien stram, men opfindsomheden var tilsvarende stor, så man lykkedes hurtigt og

# – om det gode møde






igennem hårdt arbejde med at etablere et elevgrundlag. Som en af skolens profiler etableredes landbrug som fag. Dette havde flere fordele. For det første skabte det genkendelighed, for mange af eleverne kom selv fra landbrugsfamilier. Derudover fik det pengene til at række længere i køkkenet, fordi man dyrkede meget af det, der blev spist. Samtidig var der dyrehold, som også blev brugt i køkkenet. I køkkenet fandt man dog hurtigt ud af at sige "kylling", når der var skolens kaniner, der var blevet tilberedt. Ellers ville pigerne ikke spise det.

## Faglig profil

En anden vending fra skolens første pionerår, siger, at "hvor, der er nogen, der brænder, er der et fag". Der udviklede sig et mangfoldigt fagudbud, hvor eleverne havde rig mulighed for at fordybe sig i det allerede kendte, men hvor de også kunne møde det nye og ukendte. I den særlige ramme, som efterskolen udgør, blev det pludselig legalt for drengene at vælge klassiske pigefag og omvendt. Også dette præger til stadighed skolen.

I dag har skolen særlige profilfag inden for friluftsliv/natursport og idræt, musik og teater, værkstedsfag og endelig en international profil med rejsefaget Verdensborger.

I friluftsliv og natursport er eleverne meget udendørs og lærer at begå sig i naturen. Der sejles i kano, klatres i træer, overnattes og de lærer, hvordan man tænder bål under alle vejrforhold. Idrætsfagene bruger skolens hal og er også udendørs, når der er mulighed for det. Hvert år er alle eleverne desuden på et løb med overnatning, ligesom de i maj måned er på friluftsture imellem de skriftlige og mundtlige prøver.

I musik og teater arbejder eleverne med det, de allerede kan. Hvert år er der dog også elever, som for første gang i deres liv stifter bekendtskab med kreative udfoldelser indenfor disse fag. De kan lære at spille sammen i band, vi har et velfungerende rytmisk kor og eleverne kan bruge deres fritid i musiklokalet. Hvert år laver vi en teater- og musikforestilling, hvor alle elever er involverede. Nogle er på scenen. Andre bygger den. Nogle sørger for lyd og lys, imens andre laver kostumer osv.

Værkstedsprofilen dækker over en meget bred fagrække. Der er træsløjd og –håndværk, smedje, tekstil, billedkunst, mad, it og ikke mindst praktisk arbejde på såvel bygninger som udendørsområderne. Alle elever møder også denne profil ved forskellige lejligheder i løbet af året. Det er f.eks. hyggeligt og lærerigt at grave kartofler op, når det er sæson for det.

Skolens internationale profil er et samarbejde med Folkekirkens Nødhjælp, hvor eleverne igennem et år arbejder med vores destination, Betlehem, som tema. De lærer om Mellemøstens historie med henblik på at forstå de nuværende konflikter i området. De undervises i kultur- og religionsmøde. Der arbejdes med NGO-arbejde og fundraising. Endelig koncentrerer de sig om formidling af deres oparbejdede viden. Faget involverer desuden et besøg fra Betlehem på skolen, ligesom de i foråret er på en uges rejse til Betlehem, hvor de skal se det, som de er blevet undervist i.

## De klassiske skolefag

En væsentlig opgave er at føre eleverne frem mod folkeskolens prøver, der afslutter grundskolen. Den boglige undervisning er vigtig på vores skole. Vi ynder at tale om, at vi er en praktisk-kreativ og boglig skole, og at begge ben er lige vigtige at gå på.

Vi har valgt at gøre undervisningen niveaudelt i de tre klassiske fag dansk, matematik og engelsk. Her er eleverne inddelt på hold efter niveau og ikke efter klassetrin. De arbejder således sammen med nogen, som de fagligt kan spejle sig i. Undervisningen leder frem mod de samme prøver, men undervisningsformen er forskellig. På et hold, hvor der fagligt skal samles op, drejer det sig i høj grad om at opnå små sejre, at opleve at det umulige bliver muligt. Ofte ender det med, at eleven udvikler sig meget mere end håbet, og vi sender hvert år elever i gymnasiet fra sådanne hold. På de gymnasieforberedende hold lægger undervisningen op til en større grad af selvstændigt arbejde, ligesom der forventes gode studievaner.

## Tillid og fællesskab – det handler om det gode møde

På vores skole er tillid og fællesskab omdrejningspunkterne for alt, hvad vi laver. Vi arbejder hele tiden på, at eleverne oplever sig som værdifulde, alene fordi de er til. Det enkelte fag, praktisk-kreativ som bogligt, skal understøtte dette.

Vi arbejder meget med relationer. Det være sig relationerne eleverne imellem, men også relationen imellem elev og medarbejder. Derfor er alle elever inddelt i kontaktgrupper med en gruppelærer, som er den primære voksen for eleven og dennes familie.

Vi er meget optagede af, at alle elever skal føle sig inkluderede i fællesskaberne på skolen. Vi omtaler det ofte som det gode møde. Det opstår, når vi har blik for hinanden og handler derefter. Det opstår, når vi forstår og efterlever, at min frihed nogle gange begrænses af hensynet til den anden. Det kan være en stor udfordring i et teenageliv at leve op til denne fordring. Vores samtid har fokus på det individuelle, på mig og mine behov. Derfor er det krævende at skulle have blik for den andens behov og ikke mindst at skulle føre dette ud i praksis.

Det gode møde opstår, når vi forglemmer os selv i mødet med den anden eller det andet. Det kan være i en faglig sammenhæng, når det magiske flow opstår, hvor vi er i fuld samhørighed med det, vi laver. Det kan være igennem en væsentlig samtale i Dagligstuen om de store emner i tilværelsen. Det kan ske, når en elev har brug for at tale med en voksen, fordi livet gør ondt. Det kan også hænde, når vi alle er samlet i Salen og er nødt til at vende noget, fordi tingene ikke fungerer optimalt, så vi i fællesskab må finde en god løsning.

Det handler kort sagt om dannelse. I mødet med hinanden, dannes vi, så vi bliver i stand til at mestre det liv, der er vores, i gensidig afhængighed af dem, som vi er sat sammen med. Dette kan leves ud på mange forskellige måder på de forskellige efterskoler. Formålet med denne artikel har været at give et indblik i, hvordan vi gør det på vores skole. Dette være hermed forsøgt.

# Fá upplivingar fyri lívið á Ítróttarháskúlanum í Suðuroy



GUDMUNDUR JOENSEN

LEIÐARI Á ÍTRÓTTARHÁSKÚLANUM Í SUÐUROY

Í august fær føroyski ungdómurin atgongd til eitt spildurnýtt tilboð, tá fyrsta háskúlaskeiðið byrjar á Ítróttarháskúlanum í Suðuroy.

Ítróttarháskúlanum í Suðuroy er ein nýggir møguleiki til tín, sum ynskir spennandi og mennandi ítróttarligar avbjóðingar.

Ítróttarháskúlin er ætlaður øllum, óansæð ítróttarliga støðið.

Á Ítróttarháskúlanum í Suðuroy fært tú spennandi ítróttarligar avbjóðingar, tú kemur at læra nýggj fólk at kenna, tú kemur at gerast betur ítróttarfólk og kanska eisini læra nýtt um teg sjálvan, og hvat tú megnar.

Ítróttarskúlin bjóðar fýra breytir (les meiri um tær aðrastaðni her í Eftirskúlablaðnum!), og er talan um tilboð, sum røkka breitt bæði innan ítrótt, fríluftslív og avbjóðingar í náttúruni.

Kjarnin í uppihaldinum á Ítróttarháskúlanum er, at vit ynskja at geva tær eina upplivingfyri lívið, samstundis sum tú mennist bæði sum einstaklingur og sum partur av einum felagsskapi og sum partur av samfelagnum.

Eitt háskúlauppihald merkir, at tú býrt á Ítróttarháskúlanum í háskúlaskeiðnum.

Hetta fyrsta háskúlaskeiðið, sum byrjar mánadagin 15. august 2016, er í fimtan vikur, umframt eina viku, har næmingar eru heima í heystfrítíð. Næmingar hava eisini frí í vikuskiftunum, men nøkur vikuskifti eru eisini adventure-tiltøk á skránni.

Ein vanlig vika fevnir um venjingar á ítróttarbreytunum og á adventurebreytini. Harumframt eru eisini onnur fak á skránni, m.a. føroyskt og enskt, fysiologi og anatomi, føðslulæru, kostur og venjing.

Ítróttarháskúlin heldur til í Vági, har karmarnir til ítrótt eru framúr góðir.

Á Eiðinum er fótbóltsvøllur og ítróttarhøll, og inni á Oyrunum er Páls Høll við 50 m. svimjihyli og venjingarmiðstøð.

Umframt nevndu karmar, so verður náttúran eisini ein týðandi karmur fyri dagarnar á Ítróttarháskúlan.

Náttúran í nærumhvørvinum og í Føroyum sum heild verður ein av pallunum fyri adventurebreytina og adventuredagarnar.

Tilmeldingin til heystskeiðið 2016 er byrjað, og tú kann melda teg til á heimasíðuni www.his.fo, freistin er 1. juli 2016 kl. 12.00.

Á heimasíðuni ber eisini til at lesa meiri um Ítróttarháskúlan í Suðuroy.



Grindabátar fyri vestan

# Ítróttarháskúlin í Suðuroy við fýra spennandi breytum

Ítróttarháskúlin í Suðuroy bjóðar út fýra spennandi breytir til heystskeiðið 2016, sum byrjar mánadagin 15. august 2016.

Tær fýra breytirnar eru: Svimjibreyt, fótbóltsbreyt, hondbóltsbreyt og adventurebreyt.

Breytirnar verða skipaðar í sera góðum kørmum, har hølisumstøðurnar eru í topp, og føroyska náttúran er ein av týðandi leikpallunum.

Breytirnar verða fyriskipaðar av fólki, sum eru serkøn innan økið.

## Svimjibreytin

Svimjibreytin á Ítróttarháskúlanum er ein einstandandi møguleiki at venja og gerast betri svimjari í besta umhvørvi í landinum. Karmarnir fyri svimjing verða ikki betur, enn teir eru í Páls Høll, fyrsta 50 m. svimjihyli í landinum.

Venjingin verður skipað undir leiðslu av Jón Bjarnasyni, sum er fremsti svimjivenjari í landinum, og einasti svimjivenjari í Føroyum, sum hevur vant svimjara, sum hevur kappast við Olympisku leikirnar.

Samanrenningini av framúr góðum kørmum og bestu umstøðum til svimjarar leggja upp til stórar menningarmøguleikar fyri tann einstaka á svimjubreytini.

## Fótbóltsbreytin

Fótbóltsbreytin á Ítróttarháskúlanum snýr seg um áhuga, vilja og ambitión, alt skipað í mun til tað tú persónliga vil náa innan fótbóltin. Á ítróttarøkinum á Eiðinum í Vági eru góðir karmar til fótbóltsvenjing, bæði á graslíkisvøllinum og inni í Vágs Høll.

Venjingin fevnir um bæði tekniska, taktiska og likamliga venjing og verður skipað undir leiðslu av Jón Paula Olsen, ein av okkara fremstu fótbóltsvenjarum, sum eisin hevur drúgvar royndir sum landsliðsvenjari og sum fótbóltsspælari.

## Hondbóltsbreytin

Hondbóltsbreytin á Ítróttarháskúlanum er fyri teg, sum vil menna teg sum hondbóltsleikara, lagt til rættis í mun til tínar ambitiónir. Hondbóltsvenjingin verður skipað í góðum kørmum í Vágs Høll. Skiftirúm og aðrir hentleikar eru nýgjørdir í 2016, so talan er veruliga um góðar karmar.

Venjingin verður skipað undir leiðslu av Gurið K. Mortensen, sum telist millum royndastu leikarar í landinum. Umframt royndir sum leikari, hevur Gurið drúgvar royndir sum venjari, bæði hjá besta liðnum hjá VB og í ungdómsdeildini.

Gurið K. Mortensen er harumframt útbúgving fysioterapeaut.

## Adventurebreytin

Umframt svimji-, fótbólts- og hondbótlsbreyt, verður eisini ein Adventurebreyt á Ítróttarháskúlanum, sum Petur Gotfredsson, sum er einasti føroyingur, sum er útbúgvin froskmaður í donsku specialstyrkini, "Frømandskorpset", kemur at standa fyri.

Adventurebreytin er ein sera spennandi breyt, har náttúran er høvuðsleikpallur. Breytin er ætlað breiða skaranum, ið ynskir upplivingar, venjing og summarfuglar í búkin. Umframt eitt virkið adventure lív, verða spennandi tiltøk við t.d. klintring, fjallgongu, kamping og sigling.

Breytin er skipað sum bland av styrki- og konditiónsvenjing, umframt virksemi, har adventure er felagsnevnarin.

Skráin á Adventurebreytin verður lagað viðurskiftini í náttúru og veðrinum, soleiðis at hesi eru viðspælarar.

## Heystskeiðið 2016 á Ítróttarháskúlanum

**Heystskeiðið á Ítróttarháskúlanum í Suðuroy byrjar mánadagin 15. august 2016. Hetta fyrsta skeiðið á Ítróttarháskúlanum verður í 15 vikur, umframt at heystfrítíð er í eina viku (vika 41). Heystskeiðið endar við hátíðarhaldið leygardagin 3. desembur, tá Ítróttarháskúlin bjóðar næmingum og avvarandi til hátíðarhald í samband við, at hetta fyrsta skeiðið endar. Tilmeldingin til heystskeiðið á Ítróttarháskúlanum er byrjað og fer fram á heimasíðuni www.his.fo. Seinasta freist at melda til er friggjadagin 1. juli 2016 kl. 12.00.**

*Ítróttarháskúlin í Suðuroy*



Gurið Krosslá Mortensen



Jón Pauli Olsen



Petur Gotfredsson

# Vælskikkað starvsfólkatoymið á Ítróttarháskúlanum

Ítróttarháskúlin í Suðuroy bjóðar út fýra breytir (les um tær aðrastaðni í blaðnum), men harumframt verður eisini undirvíst í føroyskum og enskum, og í lærugreinunum anatomi og fysiologi. Lærugreinin føðslulæra og kostur og venjing verður eisini á skránni.

Øll í starvsfólkatoyminum, sum kemur at standa fyri frálæruni, eru fakliga vælskikkaðir. Niðanfyri er ein stutt lýsing av starvsfólkunum, sum myndað Ítróttarháskúlan.

Leiðari av Ítróttarháskúlanum er 32 ára gamli Guðmundur Joensen. Guðmundur hevur havt eina lívsleið innan ítrótt, bæði sum frítíðar-ítróttarmaður og sum yrkisítróttarmaður. Harumframt hevur Guðmundur eisini á ítróttarleið síni verið virkin bæði innan súkling, svimjing, renning, fótbólt, kappróður og triathlon.

Guðmundur hevur harumframt royndir sum fyriskipari av ítróttar- og rørslutiltøkum.

Tær fýra breytirnar verða fyriskipaðar av sera einum sera sterkum fakligum toymið:

Svimjibreytin verður skipað undir leiðslu av Jón Bjarnason (f. 1970). Jón Bjarnason er útbúgving elite-svimjivenjari (1999 og 2000) og hevur harumframt eisini FINA-útbúgving (2001) sum venjari hjá ungdómum.

Jón Bjarnason er royndasti svimjivenjari í Føroyum og harumframt eisini sera høgt í metum millum útlendskar venjarar. Jón hevur vant bæði føroysk og donsk landslið, feløg í Føroyum og í Danmark, harumframt hevur Jón verið venjari til bæði Oyggjaleikir, Norðurlendsk meistaraskap, Evropameistarskap, World Cup kappingar, Heimsmeistaraskap og Olympiskar leikir.

Jón Pauli Olsen (f. 1968) skipar fótbólsbreytina. Jón Pauli hevur drúgvar royndir sum fótbólts-venjari í Føroyum og hevur m.a. vant lið í Effodeildini (bestu mansdeildini), A-landsliðið hjá kvinnum og U-17 landsliðið hjá kvinnum. Jón Pauli hevur eisini síðan 2013 staðið á odda fyri fótbóltinum á ítróttarbreytini hjá Vágs Skúla. Áðrenn Jón Pauli gjørdist venjari, var hann sjálvur fótbóltsspælari og hevur í nógv ár spælt í bestu fótbóltsdeildini í Føroyum.

Hondbóltsbreytin verður skipað av Gurið K. Mortensen (f. 1982). Gurið er útbúgving fysioterapeaut (2008) og hevur síðan 2008 verið knýtt at bæði fótbólts- og hondbóltsfeløgum sum fysioterapeaut, umframt at verða fysioterapeaut hjá flogbóltslandsliðnum í smb. við Oyggjaleikir. Gurið hevur eisini útbúgving sum ungdómsvenjari og hevur eisini vant bæði 1. deild kvinnur í hondbólti og ungdómslið.

Adventurebreytin verður skipað undirleiðslu av Petur Gotfredsson. Petur er 26 ára gamal, føddur í Føroyum, men hevur búð í Danmark størsta partin av sínum ungdómsárum. Petur hevur altíð verið virkin innan ymsan ítrótt. Seinnu árini hevur Petur verið virkin í Donska verjuni og er millum annað útbúgvin sergentur í danska herinum og froskmaður hjá Frømandskorpset og partur av "forsvarets specialstyrkekommando".

Í dag er Petur ógvuliga virkin innan funktionel-venjing, har dentur verður lagdur á at hava ein kropp í javnvág.

## Aðrar lærugreinar

Lærugreinarnar føroyskt, enskt, anatomi og fysiologi, føðslulæra, og kostur og venjing verða eisini skipaðar av fakbólkum innan nevndu økið.

Lærugreinin føroyskt, føroyskur skaldskapur og mál verður skipað av Dagfinni Olsen (f. 1967), Dagfinn útbúgvin lærari á Føroya Læraraskúla í 1993. Dagfinn hevur drúgvar royndir sum lærari og hevur umframt at vera lærari í føroyska skúlaverkinum síðan 1996 eisini verið lærari á eftirskúla í Danmark í 3 ár.

Enkst verður skipað av Maritu G. Nielsen (f. 1984), sum hevur lokið prógv sum kandidatur í enskum við hjágrein í sálarfrøði frá Universitetinum í Keypmannahavn (lokið prógv í 2014).

Føðslulæran verður skipað av Beintu Mohr Leo (f. 1972). Beinta Mohr Leo er útbúgvin Ernærings- og husholdningsøkonom 3½ ár og so víðariútbúgving sum Kliniksur dietistur, sum tók 1 ár (lokið prógv í 1998).Beinta hevur drúgvar royndir innan økið. Hevur m.a. undirvíst á Heilsuskúla Føroya í árúnum 2000 til 2005. Beinta hevur síðan 2005 arbeitt á Diabetes ambulatorium á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Fysiologi og anatomi verður skipað av Jón Bjarnasyni og Gurið K. Mortensen.

Umframt hesi, so fær Ítróttarháskúlin eisini vitjan av einari røð av fólki við spennandi bakgrund, sum koma at siga sína søgu um ítrótt, venjing, kost, svøvn og motivatión.

Ítróttarháskúlin í Suðuroy
hevur heimstað í Vági
Leiðari er Guðmundur Joensen
Tlf. 282000
Teldupostur: gudmundur@his.fo
Heimasíðan: www.his.fo
Tilmeldingarskjalið til heystskeiðið 2016 finnur tú her: http://his.fo/vaelkomin-a-his/tilmeldingarskjal/



Smáttur við Laksá til næmingaíbúðir

# Eftirskúli er ein íløga í framtíðina



TRÁIN PETURSSON NÓNKLETT
*Landsnevndarlimur í Unga Tjóðveldi*

Nógv ung hava havt góðar løtur á eftirskúlum í øðrum londi. Tey hava fingið nýggjar vinir og øðrvísi avbjóðingar og lærdóm. Nú er tað upp á tíðina, at vit seta á stovn ein eftirskúla í Føroyum, soleiðis, at føroyski ungdómurin fær møguleika at skapa sínar egnu søgur, vinaløg og lærdóm á einum eftirskúla í Føroyum! Ein eftirskúli er ein týdningarmikil íløga í dýrabarasta tilfeingið vit hava í Føroyum – nevniliga ungdómin.

Vit hoyra javnan, at føroyski ungdómurin flytur uttanlands og vendir ikki heimaftur. Hetta er ein veruligur trupulleiki fyri Føroyar og í longdini eisini ein beinleiðis hóttan. Tað er serliga eftir miðnámslestur, at føroyingar venda oyggjunum bakið.

Tað hevur tó kortini stóran týdning, at tey hava havt góð og fjøltáttað tilboð í Føroyum, áðrenn tey fara uttanlands at lesa. Vit skulu gera alt fyri at halda upp á ungdómin í Føroyum, so leingi sum gjørligt, tí so er størri møguleiki fyri, at tey koma heimaftur. Til hetta krevst fjøltáttað tilboð og góðar umstøður. Í dag hava vit m.a. NámX, sum er ein øðrvísi 10. floksskúlaskipan, fótbóltsflokkin í Havn, Húsarhaldsskúlan í Klaksvík og Føroya Fólkaháskúla. Ein eftirskúli hevði verið við til at økt um tilboðini í Føroyum.

Sambært einum áliti frá 2015 um eftirskúla fara umleið 120 ung av landinum á hvørjum ári á eftirskúla. Hetta bendir á, at grundarlag er fyri at seta á stovn eftirskúla í Føroyum.

## Politiski viljin er til staðar

Fleiri politiskir flokkar lovaðu áðrenn valið, at eftirskúli skuldi byggjast. Samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn greiðir soleiðis frá um týdningin av skúlaskapi: "Góður skúlaskapur og lívslong læra eru grundin undir einum framkomnum samfelag. Útbúgving og gransking verða tí millum fremstu mál samgongunnar. Førleikarnir at taka lut í fólkaræðinum eiga at verða styrktir frá barnsbeini gjøgnum skúla og útbúgving."

Hetta er ein staðfestan av, at samgongan metir, at skúlaskapur, útbúgving og gransking hava stóran týdning. Samgongan hevur eisini sett sær fyri at seta á stovn ein eftirskúla og hevur skjalfest í fylgiskjalinum til samgonguskjalið, at eftirskúli skal byggjast: "Tað hevur skund at seta á stovn eftirskúla og útbyggja háskúlar. Karmar skulu skapast, so hesir kunnu virka í ymiskum samstørvum."

Vøkur orð frá politikarum eru tó ikki altíð í samsvari við veruleikan. Vit skulu tí fylgja væl við og halda teimum fólkavaldu í oyrunum, soleiðis at eftirskúli verður settur á stovn undir hesari samgonguni. Er ætlanin fyrst veruliga byrjað, so eri eg vísur í, at eftirskúlin gerst veruleiki innan ikki ov langa tíð.

## Ein íløga í ungdómin og økið

Semja er millum kommunur í Suðuroy, at eftirskúlin skal liggja í Hvalba.

Hetta eiga vit at virða.

Summi vilja vera við, at her er onki at bjóða ungdómi, men hesum eri eg ikki samdur í. Oyggjarnar hava á hvør sín hátt spennandi umhvørvi og møguleikar - dugir mann at gagnnýta teir.

Hvalba hevur, ja øll Suðuroyggin hevur spennandi umhvørvi og ríka søgu.

Eftirskúlarnir í Danmark, har nógvir føroyingar ganga, liggja oftani avsíðis. Tað verður ikki sæð sum ein trupulleiki, tí tað er sjálvt virksemið á skúlanum, sum er tað avgerandi. Endamálið við einum eftirskúla er eisini nettupp, at næmingarnir búgva á skúlanum.

Men eftirskúlin má vera lokkandi og á støði við eftirskúlar uttanlands, t.v.s. við einum fjølbroyttum útboði av breytum og lærugreinum. Neyðugt er eisini at leggja nógva orku í at koma í samband við málbólkin beinanvegin, sum jú eru fólkaskúlanæmingar.

Tað skal vera "kul" at ganga á eftirskúla í Føroyum, og tey ungu skulu vita um møguleikan.

Ein eftirskúli er við til at menna ungdómin. Tey búgva heimanífrá í eitt skúlaár. Tey hitta onnur ung úr øllum landinum og møguliga úr øðrum londum við. Tey fáa nýggjar royndir og skapa nýggj sambond og vinaløg.

Men eftirskúlin er ikki bert ein íløga í føroyska ungdómin. Hann er eisini ein íløga í økið, har skúlin verður bygdur og føroyska samfelagið sum heild. Eftirskúlin fer at skapa arbeiðspláss og økt virksemi í lokaløkinum.

## Meira enn ein glæsiligur bygningur

Tað hevur týdning at hugsa stórt. Uttan stórar hugsjónir og greið mál hendir eingin menning í einum samfelagi. Soleiðis er eisini við føroyskum eftirskúla.

Tað snýr seg ikki bert um at byggja ein glæsiligan bygning. Honum tørvar innihald, góðar lærarar og ikki minst næmingar. Vit sóu í fjør, at háskúlin í Vági ikki bleiv til nakað í tí umfarinum, tí at ov fáir næmingar teknaðu seg. Nú tykist tíbetur at ganga væl við tilmeldingum.

Tí hevur tað stóran týdning, at tá ið eftirskúli verður stovnaður, verður fyrsta tíðin brúkt til at vitja føroyskar fólkaskúlar runt í landinum og kunna um eftirskúlan.

Skúlin eigur eisini at vera virkin á alnetinum, bæði við heimasíðu og á teimum sosialu miðlunum. Tað er so sanniliga eisini her, at skúlin kemur í samband við tey ungu. Eg ivist ikki í, at tørvur er á einum føroyskum eftirskúla, men hann skal skipast væl, vera spennandi og duga at marknaðarføra seg. Hvør 9. floks næmingur kennir ikki til tilboðini frá donskum eftirskúlum, um hvussu gott har er? Hetta kunnu vit gera eins væl í Føroyum!

Tað ber eisini til at hugsa sær, at ungdómur úr øðrum londum ynskja at koma á eftirskúla í Føroyum.

Í fyrstani eigur dentur at verða lagdur á at fáa føroyskan ungdóm á eftirskúlan, og síðani eigur mann at víðka um sítt virksemi og bjóða ungdómum úr øðrum londum higar.

Tað er væl hugsandi, at fólk úr okkara grannalondum kundu verið áhugað at búð í Føroyum í eitt ár. Hetta kann eisini hava við sær, at tey flyta hendan vegin seinni í lívinum t.d. at lesa á Setrinum.

Tað hevði verið ein øðrvísi avbjóðing hjá teimum, men ein serstakliga spennandi ein.

Landslagið, fólkið og umhvørvið í Føroyum er nakað heilt serstakt. Hetta eiga vit at brúka til okkara fyrimun.

Vit skulu síggja møguleikar heldur enn forðingar.

Vit mugu eisini tryggja okkum, at tað ikki kostar ov nógv at ganga á eftirskúlanum, og at føroyska tilboðið er kappingarført.

Eftirskúlin skal vera fyri øll og ikki bert tey, sum eiga nógvan pening.

Ungdómurin er framtíðin. Vit skulu skapa góð og fjøltáttað tilboð, soleiðis at hesin bólkur trívist.

Eftirskúlin er við til at tryggja hetta og er tí ein íløga í føroysku framtíðina.

# Suðuroy má hava fleiri skúlatilboð eftir fólkaskúlan



MARIUS KJÆRBÆK
*Lærari Vágur*

Tá eg varð spurdur, um eg vildi skriva í Eftirskúlablaðið, hugsaði eg í fyrstu atløgu at bera meg undan. Kanska kundi eg siga, at eg visti einki at siga um hatta.

Men skjótt fekk eg ein nýggjan tanka, og tað var, at nú fekk eg møguleika at gera vart við mína hugsan um skúlaskap í oyggj okra. Ella kanska manglandi skúlamøguleikar hjá okra ungu, í mun til teir mongu møguleikar, sum standa ungum aðrastaðni í landinum í boði.

Landfast er eftirhondini millum fleiri skúladeplar norðanfyri. Har kann ungdómurin búgva heima og taka útbúgvingar av øllum møguligum slag. Tey kunnu velja, um tey koyra norðureftir, suðureftir, eystureftir ella vestureftir. Allastaðni koma tey til ein skúladepil. Og skúladeplarnir hava í fleiri førum somu útbúgvingar at bjóða, og so hava teir harafturat onkra serútbúgving, soleiðis at tilboðini eru rættiliga fjølbroytt og geva teimum ungu valmøguleikar. Hetta er alt sera gott.

Harafturat eru tey stóru arbeiðsplássini við sínum mongu læruplássum eisini í fjølbygdu økjunum norðanfyri. Eg hugsi her um skrivstovulæru og handverkaralæru og eisini lærupláss í el og tøkni vinnuni.

## Suðuroynni tørvar skúlatilboð

Seta okur alt hetta upp ímóti teimum møguleikunum, sum okra ungu í Suðuroynni stendur í boði, so er lætt at síggja, at her er stórur munur, um tú hugsar um møguleikar, har tú kanst búgva heima í útbúgvingartíðini.

Okra ungdómur í Suðuroy kann velja antin at fara í studentaskúla ella heilsuskúla. Longri er tann søgan ikki.

Ofta hugsi eg um studentaskúlan, sum uttan iva fær nógvar næmingar, sum als ikki áttu at gingið har, men søkja inn, tí einki annað er. Ein og hvør kann hugsa sær, hvørja ávirkan tað man hava á støðið. Eg kenni onkran, sum av neyð hevur tikið studentsprógv, men ikki kann brúka tað til nakað, tí kanska vóru hvørki evni ella hugur til staðar.

## Neyðugt við eftirskúla

Eftirskúli skal setast á stovn í Føroyum. Breið semja er um tað. Hann skal vera í Suðuroynni, og avgjørt er fyri langari tíð síðani, at hann skal vera í Hvalba, og stykki er fingið til vega eisini.

Men knappliga hoyrist, at nú skal hann vera á Drelnesi. Hetta tykist mær margháttligt, tí skuldi tað komið uppá tal at flutt skúlan, so kundi tað verið, tí at ynski vóru um at fáa meira lív í skúladeplin í Grønadali.

Ymsar grundir skulu eitast at vera fyri at byggja eftirskúlan á Drelnesi.

Men ongin av hesum grundgevingum heldur í veruleikanum.

## Útbyggja Skúladepilin

Suðuroyingar eiga ikki bert at krevja eftirkúla bygdan nú. Okur eiga eisini at krevja skúladepilin útbygdan, so ungdómur okra eisini fær vælmøguleikar. Virkir mugu onkursvegna stuðlast í at taka inn lærlingar, so hesin møguleiki eisini er at finna í oynni.

Hetta er alneyðugt, tí sjálvandi skulu útbúgvingarmøguleikar vera her í oynni, eins og tað eru aðrastaðni runt um í landinum.

Um suðuroyingar kundu staðið saman um, hvar hesin skúlin skal vera, so hugsi eg, at gongd hevði komið á nú.

## Semja Hvalba

Kommunurnar hava eina semju um eftirskúla í Hvalba, og tær eiga tí at vísa á hesa semju og koyra undir, so gongd kemur á bæði viðvíkjandi eftirskúlanum og eisini øðrum útbúgvingum, so suðuroyingar hava javnbjóðis skúlamøguleikar við onnur í Føroyum.